F I S K I M Á L A R Á Ð I Ð

Sp/f Larsen Fishing Gear
Mylnugøta 38

700 Klaksvík

Fiskivinnustovan
08.10.2020
Fiskiloyvi nr. 60704

Kvotaskjal

Hjálagt sendir Fiskimálaráðið fiskiloyvi:

Royndarveiða eftir taskukrabba og fjørukrabba

FISKIMÁLARÁÐIÐ

Fiskivinnustovan
08.10.2020
Fiskiloyvi nr. 60704
Kvotaskjal

Royndarloyvi

Royndarveiða eftir taskukrabba og fjørukrabba

Hetta royndarloyvið er latið samsvarandi ásetingum í § 50 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi, við møguligum seinni broytingum.
Loyvið heimilar royndarveiðu og áleggur skyldur og treytir, sum ásett í loyvinum.

Eigari:	Sp/f Larsen Fishing Gear
Skip:	DALFOSS
Kallimerki:	XPF2916
Havnakenningarmerki:	TG 22
Gildistíð:	Frá: 08.10.2020
	Til: 31.12.2021

Veiðirættindi:	Fiskasløg	Taskukrabbi Fjørukrabbi
	Royndarveiða:	1.000 rúsur
	Fiskileið:	Innara landleiðin
	Viðmerking:	Einki ávíst fiskidagatal ásett. Veiðirættindini eru avmarkaði til royndarveiðu eftir taskukrabba og fjørukrabba sunnanfyri og eystanfyri Tórshavn, (sum er víst á einum serligum korti sum ávikavist reytt og grønt øki. Hetta kortið er sent loyvishavaranum í telduposti saman við royndarloyvinum)

Reiðskapur: Teinar/rúsur

Jákup Mørkøre

Treytir

1. Skiparin/bátsformaðurin skal fylgja teimum reglum, sum galda fyri fiskiskap á føroysku landleiðunum, tvs. sum eru ásettar í lóg um fyrisiting av sjófeingi og kunngerðum.
2. Royndirnar skulu bert fevna um beinleiðis veiðu eftir taskukrabba og/ella fjørukrabbavi við rúsum. Hjáveiða av botnfiski er ikki loyvd. Fiskiskapur eftir øðrum fiskasløgum á sama túri er ikki loyvd.
3. Loyvt er í mesta lagi at hava 1000 rúsur standandi í sjónum í senn, og í mesta lagi 100 rúsur í strekkinum og sama stað.
4. Royndarfiskiskapurin skal fara fram í samstarvi við Havstovuni.
5. Ikki er neyðugt at seta kvennkrabbar út aftur, men taskukrabbi minni enn 14,0 cm (í tvørmál) og fjørukrabbi minni enn 7,0 cm skulu setast út aftur so skjótt sum støddin er máld (eftir leiðbeining frá Havstovuni).
6. Nágreinilig dagbók skal førast yvir royndirnar eftir leiðbeining frá Havstovuni herundir, hvussu nógvar rúsur eru í sjónum, og hvussu nógvar vera drignar hvønn dag.
a) dato, klokka, positiónir, dýpi, rúsur og veiða av krabba vm.
b) fiskur og alt annað, ið kemur í rúsurnar, skal skrásetast.
Upplýsingarnir skulu skrásetast á serligum Excell-skabelón, sum er gjørd til endamálið av Havstovuni, (sum skal sendast inn mánaðarliga til Havstovuna og Fiskimálaráðið).
8. Fólk frá Havstovuni/Vørn skal kunna vera við bátinum, um tað er ynskiligt, og ber ánarin møguligan kostnað av hesum.
9. Royndarfiskiskapurin skal ikki vera øðrum fiskiskapi at ampa ella vera til ampa fyri alivinnuna. Um neyðugt skal víkjast fyri øðrum fiskiskapi.
10. Loyvishavari skal kunna útgreina, hvussu hagreiðing, goyming, virking og søla av vøruni er farin fram.
11. Reiðarin/skiparin skal beinanvegin eftir landing senda Fiskiveiðieftirlitinum/Vørn vektarseðilin. Eisini skal vera tilskilað, hvar veiðan er fiskað.
12. Skrivlig frágreiðing um royndirnar (íroknað hagreiðing, goyming, flutning og sølu) skal latast Fiskimálaráðnum og Havstovuni, tá royndartíðin er av, og áðrenn møguligt nýtt royndarloyvi verður útskrivað. Allar skásetingar skulu fylgja við frágreiðingini.